## Kalt í Grønlandi

Fyri nøkrum mánaðum síðani varð dagliga tosað og skrivað um, hvussu tann veksandi hitin á Jørðini fær ísin í Grønlandi at bráðna, og nú frættist, at hesin veturin er tann kaldasti í Grønlandi í 10 ár. Eitt nú liggur øll Diskovíkin undir ísi, sum er hálvan annan metur tjúkkur. Í gjár vóru 26 kuldastig í Ilulissat, og so kalt hevur tað ikki verið har síðani 1996. Nuuk hevur havt millum 20 og 25 kuldastig, men nú siga veðurmenninir lýggjari veður.



# gið móðurmál



*Agnar F. Joensen, Hemming Petersen, Herborg Hansen, Lilja Thorsteinsson og Hermann Mørkøre eru í ferð við at leggja síðstu hond á fyrstu føroysku slangorðabókina »Hvista«*

ingum. Tí er tað nokk ikki so býtt at hava ein maskott, sum minnir á gamlar føroyskar máliskur, heldur Lilja.

### Munur á slang og stíli

Ein trupulleiki við at gera eina slíka bók er, at tað allatíðina koma nýggj slangorð og nýggjar styttingar. Tí eru tey á Hvista sinnaði at taka ímóti nýggjum orðum líka til beint áðrenn bókin fer til prentingar. Orðini, tey higartil hava við, hava tey millum annað fingið frá skúlaflokkum kring landið.

- Vit hava biðið flokkar á flestu skúlunum sent okkum listar yvir slang og styttingar, tey vanliga brúka, tá tey sms'a, chatta. Tey hava eisini havt møguleika at finna uppá nýggj orð, sum kanska koma við í bókina, sigur Hermann Mørkøre, ið er fíggjarstjóri í Hvista Í/F.

Flestu skúlar hava tikið væl ímóti áheitanini, men onkur lærari hevur ikki verið serliga væl við uppá hugskotið. Tey fimm aftanfyri hugskotið skilja ikki rættiliga, um onkur kanska er bangin fyri, at ein slík bók fer at fáa eina keðiliga ávirkan á skrivaða málið hjá næmingunum og teimum ungu. Tey minna á, at eftirhondini eru tað fleiri kanningar, sum vísa, at nýtslan av sms- og chatmáli onga ávirkan hevur á, hvussu væl ella illa ung annars duga at málbera seg skrivliga.

- Tá tú skrivar stíl í skúlanum, veist tú, at ávísar treytir eru galdandi. Skrivar tú eitt sms, eru aðrar treytir galdandi. Eg kenni ongan á mínum aldri, sum ikki dugir at skyna ímillum, nær man skrivar eitt sms ella ein stíl. Faktiskt eru tey ungu rættiliga tilvitað um at laga málið eftir teimum, tey samskifta við, sigur Agnar.

### Prentað í Danmark

Um smáar tvær vikur fer Hvista til prentingar, og síðani fara høvundarnir at brúka orkuna uppá millum annað marknaðarføring og endaligu framløguna í SMS um miðjan mars mánað.

Endamálið við verkætlanini er, at næmingar á miðnámsskúlum skulu læra ella fáa innlit í, hvussu tað er, at seta sítt egna virki á stovn í veruleikanum. Tað vil siga, at tað til dømis ikki er nokk hjá teimum í Hvista at leggja eina fíggjarætlan, og so vóna, at hon heldur. Tað er eitt krav, at tey megna at savnað tær 10.000 krónurnar, ið verkætlanin kann kosta.

Spurd, hvat hevur verið mest strævið við at seta á stovn sítt egna virkið, eru tey fimm rættiliga samd.

- Tað er at bíða eftir svarið uppá til dømis umsóknir um stuðul. Nógvar stórar fyritøkur viðgera allar slíkar umsókir eina ferð um mánaðin, og tað er ikki víst, at tú hevur tíð at bíða, tí tú mást sleppa víðari við verkætlanini, siga tey.

Annars undra tey seg yvir, at tað er so dýrt at prenta bøkur í Føroyum. Tað er eisini orsøkin til, at tey valdu at lata bókina prenta í Danmark. Tað var einasti møguleiki, um fíggjarætlanin yvirhøvur skuldi kunna hanga saman, siga tey.

**FAKTA**

### Ungt Virkið

Ungt virkið er kapping millum næmingar á Tekniska Skúla í Klaksvík, Handilsskúlanum í Havn og Handilsskúlanum á Kambsdali. Næmingarnir skulu byrja sítt egna virki undir somu treytum sum, sum virkir vanliga verða stovnaði og eisini framleiða eina vøru, sum virkið kann selja.

Tey ymsu virkini sýna vørunar frá í SMS um miðjan mars mánað. Har hava virkini hvør sín bás, har tey skulu greiða frá og selja sína vøru.

Áðrenn framløguna hava virkini latið dómararnum eina virkisætlan. Grundarlagið fyri dømingini er hendan virkisætlan, sjálvur básurin, framløgan og ein samrøða við dómararnar. Vinningurin er luttøka í kappingini Ung Virksomhed í Danmark seinni í ár. Har er vinningurin luttøka í eni evropeiskari kapping, sum Young Enterprise skipar fyri. Besta virkið har verður útnevnt Company of the Year.